**JA**

*Óli Breckmann*
*Poul Michelsen*
*Heðin Zachariasen*
*Edmund Joensen*
*Kaj Leo Johannesen*
*Lisbeth L. Petersen*
*Olav Enomoto*
*Andrias Petersen*
*John Johannessen*
*Annita á Fríðriksmørk*
*Heidi Petersen*
*Tórbjørn Jacobsen*
*Karsten Hansen*
*Bill Justinussen*
*Jenis av Rana*
*Kári P. Højgaard*



# Meiriluti fyri einum valdømi

**Longu til komandi løgtingsval verða Føroyar eitt valdømi. Sosialurin hevur spurt øll tingfólk, og meirilutin er fyri. Edmund Joensen, løgtingsformaður, fer at leggja uppskotið fram í heyst**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Úrslitið av spurnakanningini hjá Sosialinum var, at 16 tingfólk eru fyri og 11 eru ímóti at Føroyar verða eitt valdømi. Fýra høvdu ikki tikið støðu enn, og ein vildi ikki svara. Tað má metast at vera sera ósannlíkt, at allir hesir síðstu fimm fara at atkvøða ímóti uppskotinum.

### Fría valið

Við jøvnum millumbilum hoyra vit, at vallógin átti at verið broytt. Til tíðir við rokniháttinum, so meiri rættvísi verður millum atkvøðubýtið og tingmannabýtið, og aðrar tíðir við kynspolitiskum grundgevingum.

Nú Edmund Joensen, løgtingsformaður, ætlar at leggja uppskot fram um Føroyar sum eitt valdømi, eru grundgevingarnar í stóran mun knýttar at landafrøðiligum og samskiftistøkniligum broytingum í samfelagnum seinastu árini. Harumframt eru valmøguleikarnir hjá veljarum í smáu valdømunum sera avmarkaðir, so verður landið eitt valdømi, kunnu allir veljarar velja frítt, bæði við landafrøðisligum, hugsjónarligum og persónligum atlitum.

### Savna lesull

Millum teir, sum eru ímóti, eru grundgevingarnar bæði landafrøðiligar, politiskar og fíggjarligar. Næstan allir siga, at hetta fer at vera endin fyri útjaðaran í Føroyum. Teir vilja vera við, at fólk í miðstaðarøkinum hava nógv betri atgongd til miðlarnar, vitanina og pengarnar, og soleiðis hava lættari við at tekkjast veljarunum kring alt landið. Anfinn Kallsberg úr Fólkaflokkinum segði seg tó ikki taka undir við uppskotinum, tí hann altíð hevur verið forsprákari fyri einari skipan við 32 valdømum, eins og vit kenna tað úr Onglandi.

Sambært Kristiani Magnussen úr Javnaðarflokkinum, verður avleiðingin, at Føroyar framyvir bara verða stýrdar av einari stætt, nevniliga teimum, sum hava pening, útbúgving og miðlatekki. Tí kann hann ikki taka undir við uppskotinum.

Sverri Midjord úr Javnaðarflokkinum viðmerkti, at Edmund Joensen og Jóannes Eidegaard eru so ídnir at broyta vallógina, tí teir eru bebbaræddir fyri ikki at verða valdir við komandi valg.

- Hetta er sum at savna lesull, sum Danbjørg tók til á sinni.

Millum atfinningarnar var eisini víst á, at hetta er alt ov seint at koma við einum slíkum uppskotið, tí flokkarnir eru longu farnir undir at fyrireika valstríðið og at umhugsa uppstillingina. Tí átti hetta at verið eitt mál, sum fólk kundu farið til valg uppá, vildi onkur vera við. Her var eisini borið fram, at orsøkin til, at uppskotið verður lagt fram so seint, møguliga er, at tað fer at hava við sær, at samgongan skrædnar, men at tað hevur minni týdning seint í valskeiðinum enn tíðliga.

### Størri eindir ein treyt

Tríggir teirra, sum søgdu seg ikki hava tikið støðu enn, Jóhan Dahl úr Sambandsflokkinum og Finnur Helmsdal og Høgni Hoydal úr Tjóðveldisflokkinum, grundgóvu fyrivarni síni við, at ein treyt fyri einum valdømi eru størri kommunalar eindir, og eisini fíggjarligar útjavningarskipanir, at styrkja útjaðaran við.

Edmund Joensen segði, at samanlegging av kommunum, ið eftir ætlan fer at minka talið av kommunueindum til 7, longu er á veg, og at skipanin við einum valdømi eisini fer at eggja kommununum til at leggja saman skjótari.

- Men hetta er ikki ein partur av hesum uppskotinum, sum helst fer at vera í tveimum, har annað verður at stytta um freistina at útskriva valg, so valstríðið ikki verður so drúgt, umframt at broyta valskipanina til eitt valdømi.



# Góðar vónir fyri undirtøku

**Edmund Joensen, sum fer at leggja uppskotið um eitt valdømi fram í heyst, roknar við, at tað verður samtykt.**
**- Hetta er nakað eg kenni á mær. Annars hevði eg ikki ómakað mær at fyrireika tað. Teir, sum siga seg ikki hava tikið støðu enn, sita í veruleikanum og lúra og vilja brúka tað til at handla við, sigur Edmund Joensen**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tíðliga í heyst fer Edmund Joensen, tingformaður, at leggja fram uppskot um at broyta valskipan Føroya, so landið framyvir bert verður eitt valdømi.

- Eg fyrireiki sjálvur uppskotið. Síðani skal tað til viðgerðar í formanskapinum, og so verður tað upp til tey fólkavaldu at taka støðu til um tey ynskja eitt valdømi, sigur Edmund Joensen. Um orsøkina til, at leggja uppskotið fram júst í heyst, sigur Edmund seg hava varhugan av, at meiriluti er fyri einum slíkum uppskotið nú.

- Endamálið við einum valdømi er, at landspolitikarar fara at føra landspolitikk og ikki, sum nú, har ov nógv orka fer til lokalpolitik, sigur Edmund Joensen.

### Kendu andlitini

Spurdur, um vandi ikki verður fyri, at tað bert vera tey væltalandi og vælhavandi í miðstaðarøkinum, sum fara at stýra landinum framyvir, sigur tingformaðurin, at soleiðis er longu nú.

- Óansæð hvørja skipan vit hava, verða tað í alt størri mun tey, sum duga og hava ráð til at selja seg sjálvi gjøgnum miðlarnar, ið hava størri møguleika at verða vald. Í londunum kring okkum síggja vit eisini, at miðlarnir, pengarnir, kendu andlitini og einstøku valevnini hava størri møguleika fyri at verða vald, sigur Edmund Joensen, sum eisini ímyndar sær, at formanseffektin fer at hava alt størri ávirkan, og at tey, sum frammanundan eru fólkavald, hava betri møguleika fyri at verða vald.

### Góð tíð til fyrireiking

Summi vilja vera við, at tað er óðamannaverk at leggja uppskotið fram so seint í valskeiðinum. Flokkarnir eru longu farnir undir uppstillingina, og hava heldur ikki havt tíð til at leggja valstríðið til rættis við støði í, at landið verður eitt valdømi. Hvat sigur Edmund Joensen til hetta?

- Viðvíkjandi uppstillingini væntí eg ikki, at hetta fer at hava so stóra ávirkan. Sambært løgmanni verður valið 18. januar, so her átti at verið góð tíð til at fyrireika uppstillingina, sigur Edmund Joensen. Hann vísir víðari á, at verður uppskotið samtykt, so krevur tað sjálvsagt, at flokkarnir umskipa mannagongdirnar í mun til uppstillingina, og eisini mugu hugsa meira um at fáa sterk valevni úr øllum landinum.

- Sum sagt havi eg greiðan varhugan av, at uppskotið verður samtykt, annars hevði eg ikki ómakað mær at fyrireika tað. Teir, sum siga seg ikki hava tikið støðu enn, sita í veruleikanum og lúra og vilja brúka tað til at handla við. Tað er eisini í lagi, men eg haldi meg vita, hvat úrslitið verður, sigur Edmund Joensen.

Hann dugur ikki at siga námeiriliga nær uppskotið verður lagt fram, men tað verður í ikki longu á ólavsøku.